TING-HELLAN

# Játtanarskipanin er eitt amboð,

**Seinnu árini hava vit verið vitni til eina sterka sentralisering av stýringini av landsins útreiðslum, hóast vit samstundis hava sæð eina hækking í støðinum av alment settum leiðarum úti a stovnum og grunnum. Eisini eru amboðini nógvar ferðir betur í dag enn fyri bert fáum árum síðani, og ti er óskilligt, at vit í dag hava eina játtanarpraksis, har "systemið" tykist verða viktigari enn tingsins vilji. Eingin steðgar á og diskuterar tað absurda í at ein játtanarskipan, ið skuldi verið eitt relativt simpult amboð til sambinding av Tingsins vilja og tað útinnandi valdið, verður síðustillað við Stýrisskipanina sjálva. Útyvir lættar rættingar, sosum at lata verða við at kvetta alt av 1 januar og koyra aftur í stóra pott, so krevst ein hugburðsbroyting í okkara umsiting, har man setur seg niður at fundera yvir, hvat Tingsins vilji var og er, eitt nú tá Stýrisskipanarlógin, ið núverandi játtanarskipan vísir til, var gjørd**



TINGHELLUANALYSAN

*Thomas Arabo*



### Apoteksgrunnurin, ið hvarv

Í september í 1988 var eg við til at samtykkja lóg um apoteksverk og heilivág, har Apoteksgrunnurin varð stovnsettur. Avlopið frá apoteksraktrinum fór í hendan grunn. Peningurin, ið soleiðis var settur til síðis, skuldi bert brúkast til apoteksvirksemi. Persónurin, ið fekk ávísingarrætt til hesar pengar var Landsapotekarin, so hetta var ikki ein grunnur í vanligari merking. Hetta var tað, sum var tingsins vilji. Hetta vildu vit, sum samtyktu hesa lóg í 1988.

Miðskeiðis í 90'unum var peningurin í Apoteksgrunninum eftir áheitan settur í Landsbankan. Tað var ivaleyst ein ávísur logikkur í hesum, eftirsum Landsbankin m.a. hevur til endamáls at umsita landsins likviditet. Tað var ikki uppá tal, at peningurin skuldi brúkast til annað enn tað, sum peningurin í Apoteksgrunninum sambært politiska viljanum skuldi brúkast til.

Fyri stuttum hendi so tað, at peningurin knappliga var fluttur av kontoini hjá Apotkesgrunninum inn í gjaldførið hjá Landskassanum, uttan at Apoteksleiðslan visti nakað. Hvør tók avgerð um hetta? Hvør ávísti flytingina?

Tá so Apoteksverkið skal brúka pening til íløgur, ið eru neyðugar fyri at apoteksvirksemið kann halda fram, so vil Tingið ikki játta, hóast peningurin í Apoteksgrunninum var oyramerktur til júst slík endamál. Nú skal alt kroystast inn í tann alt ov ófleksibla praksisin, ið tíverri er lagdur seinastu árini. Meira álvarsamt merkir hetta, at tann peningur, ið man í 1988 var so framsíggin at seta til síðis og oyramerkja til apoteksvirksemi nú knappliga er farin í stór pott. Hetta má verða í stríð við lógina um apotek og heilvág, ið eg sjálvur havi verið við til at samtykt. Í hvussu so er, so kann eg vissa bæði Gjaldstovu, Landsgrannskoðara og Fíggjarmálaráðum, at hetta sum er hent viðvíkjandi Apoteksgrunninum er í andsøgn við tað, ið vit sum tinglimir samtyktu tá Lóg um Apoteksverk og Heilivág var samtykt.

### Bakka til 2015?

Hvør stendur til svars fyri hesa gerð? Er hetta enn eitt dømi, har embætisfólk renna frammanfyri Løgtingið í yvirídni at betongtulka okkara stýriskipanarlóg? Hvar eru tinglimir? Er eingin, ið torir at sláa nevan í borðið og seta embætisverkið uppá pláss, tá tað fer útum sínar heimildir? Tað mest syrgiliga er, at hetta kann koma at kosta vællærd og vitanartung arbeiðspláss. Ikki tí, at Tingið bevíst ynskir hetta, men tí at skipanin forkemur virkseminum. Hetta hendir, meðan vit tosa um Føroyar í ár 2015, biotøkni og aðrar fantastiskar framtíðarætlanir. Ironiskt, má man siga.

### Signar gjørdi púra rætt

Kanska er ein stórur partur av trupulleikanum eitt ov veikt ting, ið ikki torir at koma við greiðum útmeldingum um sjálvfylgilig ting. Eitt sera grefligt dømi um spill av tíð og kreftum var dømið, har Signar á Brúnni sum Landstýrismaður betalti lønir í Sjónvarpi Føroya, útyvir vanligu játtanina. Tað stendur heilt greitt, at landið kann ikki skylda løn. Signar á Brúnni royndi at kalla tingsins Fíggjarnevnd saman, men tað eydnaðist ikki. Hann kundi so velja at lata landið skylda lønir ella gjalda tær út. Hann gjørdi sum rætt var og betalti løn út. Tað sum síðan hendi var tann reina farsa. Ein løgfrøðingur fór at tosa um at stýrisskipanarlógin var brotin, tí at Landstýrismaðurin hevði betalt løn út, uttan eykajáttan. Og so koyrdi myllan í fjølmiðlum. Eitt er, at fjølmiðlar viðhvørt hava ilt við at síggja sjálvfylgilig ting, men tað vánaligasta var, at Tingið ikki beinanvegin bakkaði upp um Signar á Brúnni, tí at hann disponeraði út frá tí, at landið ikki kann skylda lønir. Hetta gjørdi tingið ikki, og eina dýra frágreiðing seinni og eftir ein offraðan landstýrismann á tí populisitiska altarnum, so fingu vit sjálvfylgiligheitina at vita, nevniliga at Signar á Brúnni hevði tikið ta røttu avgerðina.

### "Systemið" yvir Tinginum?

Hvat gjørdi, at tað endaði so galið sum tað gjørdi? Hvar var embætisfólkið? Hvar var serfrøðin undir Fíggjarmálaráðnum, ið kundi fortalt øllum Føroya Fólki beinanvegin, at landið kann ikki